## Skuldu hildið fast

Hóast hann enn einaferð kom á máltalvuna, so kundi Allan Mørkøre eftir dystin sunnudagin ikki fjala, at hann var eitt sindur vónbrotin um, at tað ikki eydnaðist at taka øll stigini í dystinum móti Skála.

- Eg haldi sjálvur, at vit hava gott tak á teimum. Fyrstu løtuna eru vit tó als ikki klárir, og vit verða eisini revsaðir. Men vit klára so at stríða okkum aftur í dystin.

- Eftir steðgin haldi eg ikki, at teir hava ein tann einasta møguleika, meðan vit hinvegin hava fleiri støður, sum kunnu gerast heilt vandamiklar. Vit skapa eisini møguleikarnar, men vit klára ikki at lukka dystin, og so fáa teir ístaðin eitt mál eftir innkast, har vit vita, at teir eru lívsfarligir.

Hetta var triðja ferðin á rað, at B36 spældi javnt, og Allan viðgekk eisini, at tað kann gerast tungt í longdini, tó at hann eisini sá glottar í hesum.

- Tað kann sjávlandi kosta, um ov nógvir javnleikir koma á skránna. Men hinvegin, so hava vit nú spælt tríggjar ferðir móti hinum oddaliðunum uttan at tapa, og tað merkir í øllum førum, at vit ikki lata tey fara framvið. Og spurdi tú okkum undan hesum trimum dystunum, so vórðu teir nokk til sølu fyri tríggjar javnleikir.

- Móti NSÍ næstu ferð skal talan tó helst verða um sigur. Skulu vit halda fast um oddasessin, so verður tað neyðugt við sigrum. Somikið einfalt er tað, helt Allan at enda.

-jm



*Hóast tríggir javnleikir á rað kunnu kosta nógv, so helt Allan tað vera positivt, at teir enn ikki hava tapt nakran av dystunum móti HB og Skála*

B36-Skála 2-2 (1-1):

# Full ferð á oddastríðnu

**Ferðin í Gundadali var í toppi, tá Skála og B36 býttu stigini, og eisini í oddastríðnum er verulig ferð komin á spenning, har Skála**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*

*Myndir: Álvur Haraldsen*

Fyri aðru ferð innan knappar tvær vikur dystaðust B36 og Skála sunnudagin. Hesaferð var Gundadalur staðið, har dysturin fór fram, men samlaða úrslitið varð tó ikki stórt øðrvísi. Ein javnleikur í einum dysti, sum kanska kundi fari báðar vegir, tó at heimaliðið helst var parturin, sum hevði størstu orsøkina at iðra seg.

### Sovandi heimalið

Fyrstu løtuna var tað tó Skála, sum setti dagsskránna. Klokkan var ikki meira enn farin um fyrsta minuttin, tá Bjarni Jørgensen á miðjum vølli fekk fatur á eini skeivari sending frá Óbi. Vanliga eru Pól Thorsteinsson og Fróði Benjaminsen ikki menninir, sum tú snýtir uttan víðari, men tað legði Bjarni ikki stórvegis í. Hann gjørdi ikki mætari enn at renna beina leið gjøgnum B36 verjuna, og tá landsliðsmálverjin kom ímóti var Bjarni nóg kaldur til at trilla bóltin flatt í handara hornið.

B36 tóktist nærum skelkað av bragdligu byrjanini hjá gestunum, og næstu góðu løtuna sat Skála á mest sum øllum. Lítið hekk saman hjá vertunum, og tá Skála vann bóltin, settu teir oftani ferð á, og fleiri ferðir gjørdist eisini talan um heilt vandamiklar støður. Nærmast við var Bogi Gregersen, tá hann smekkaði til av brotsteigarhorninum. Skotið hevði beina kós oman í síðunetið, men við ytsta pettinum av neglunum fekk Jákup Mikkelsen skavað bóltin yvir á stólparótina.

Og spakuliga raknaði oddaliðið við. Ikki minst miðvøllurin, har Fróði Benjaminsen og Mikkjal Thomassen fyrstu løtuna snorksvóvu, kom nú í snúningar, og teir otaðu seg alt meira niðan á Skála hálvuna. Uppskriftin til hetta var sum so sera einføld. Knallhart arbeiði úr enda í annan. Syngjandi tacklingar vórðu gjørdar frá báðum pørtum kring allan vøllin, men spakuliga hómaðist tó, at Skála-miðvøllurin helst gjørdist taparin í hesum stríðnum. Ikki minst, tí teir saknaðu vanligu miðvallar-dynamo'ina, Paula G. Hansen, sum var úti við skaða. Í hansara stað var Pætur Dam Jacobsen mitt á, og tó at hann er bæði raskur og sterkur, so hevur hann ikki heilt sama drive í spælinum, sum Pauli hevur.

### Kontant á miðvøllinum

Ein útjavning lá allar helst í luftini, og hon kom eisini, tá farið var um miðjan hálvleikin.

Mikkjal Thomassen varð feldur, tá hann dróg niðan móti brotsteiginum, og eftirfylgjandi frísparkið varð Allan Mørkøre settur at skjóta. Bólturin bar við Fróða Benjaminsen á vegnum, og so var Vlada Filipovic púrasta seldur, tá bólturin umvegis handara stólpan fór í málið.

Og um nakað, so setti hetta av álvara meira ferð á dystin. Nærdystirnir gjørdust - um gjørligt - enn fleiri í tali. Ikki minst Mikkjal Thomassen og Ingi Højsted vóru harðir í sínum tacklingum, og meira enn ta einu ferðuna lógu spælarar venandi eftir á vøllinum eftir harðliga viðferð í nærdystunum.

B36 fekk nú eisini skapt sær nakrar møguleikar. Ikki minst, tá tað nakrar ferðir eydnaðist Alex dos Santos at koma framvið í vinstru, ella tá hann varð sendur niðan at taka vandamiklu hornaspørk síni.

Men vertirnir máttu tó bíða til eftir steðgin, áðrenn teir fingu løn fyri stríðið. Óbi rann lættliga Rúna Rasmussen av, tá ein langur bóltur varð sendur niðaneftir, og tó at skotið frá nigerianska framherjanum ikki var tað harðasta, so fekk Vlada bert hálvbjargað bóltinum, og so var Allan Mørkøre fyrstur á returinum.

### Hjálpti at missa Pól

Og so var tað B36, sum átti tørn at avgera dystin. Skála tóktist ikki reiðiliga gearað til mótbrekkuna, sum var. Kanska høvdu teir í huga, hvussu B36 seinastu løtuna fyri 10 døgum síðani mest sum át seg aftur í dystin, og ferð eftir ferð tóktust gestirnir at bakka eftir hæli, heldur enn at trýsta spælið niðan.

Ein týðandi orsøk til hetta var kanska eisini, at Pól Thorsteinsson var farin út við skaða í steðginum. Tað var sjálvandi ein missur fyri B36, og tað var sjálvandi eisini ein missur, soleiðis at Fróði Benjaminsen soleiðis varð fluttur av miðvøllinum, men hinvegin flutti hetta Inga Højsted inn á sentrala miðvøllin, har hann trívist nakað nógv betri, enn hann ger í síðuni.

Tað gav líka sum spælinum hjá B36 eina eyka dimensión, soleiðis at bólturin nú eisini kundi førast niðan við stuttum sendingum, heldur enn bara at dúva upp á neyvu longu sendingarnar frá Santos, tá álop skuldu byggjast upp.

Og tað var eisini um reppið, at B36 nú fekk avgjørt. Fleiri ferðir eydnaðist teimum at bróta spælið á miðjum vølli, fyri síðani at seta ferð á omaneftir, men tó at upptrekk til opnar møguleikar vóru, so kom tann heilt stóri kjansurin ikki.

### Vandamikil innnkøst

Og spakuliga fekk Skála so eisini fatur á rætta endanum. B36 hevði kanskta nýtt ov nógva luft í royndunum at avgera dystin, og í øllum førum tóktust gestirnir hava betru orkuna og størri sálarligu yvirvágina seinastu løtuna.

Teir otaðu seg spakuliga niðaneftir, og tó at eingin opin møguleiki spurdist



## Fakta um dystin

**B36-Skála 2-2 (1-1)**

0-1: Bjarni Jørgensen, 2.
1-1: Fróði Benjaminsen, 26.
2-1: Allan Mørkøre, 48.
2-2: Jónhard Frederiksberg, 79.

Dómari: Petur Reinert. Kom væl frá eini ferðmiklari uppgávu, har hann eisini kundi valt at floyta dystin sundur og saman. Tað hendi tíbetur ikki.

B36: Jákup Mikkelsen - Kenneth Jacobsen, Herbert í Lon Jacobsen, Pól Thorsteinsson (Bergur Midjord, 46.), Alex dos Santos - Ingi Højsted, Mikkjal Thomassen (Bárður H. Joensen, 85.), Fróði Benjaminsen, Eyðun Højgaard - Allan Mørkøre, Obele Okeke Onyebuchi (Thomas H. Rubeksen, 75.)

GK: Kenneth Jacobsen, 46., Fróði Benjaminsen

Skála: Vlada Filipovic - Bárður Danielsen, Rúni Rasmussen, Milic Curcic, Iulian Florescu - Bjarni Jørgensen (Rói Jacobsen, 55.), Pætur Dam Jacobsen, Nenad Stankovic, Hanus Thorleifsson (Sveinur Justinussen, 90.) - Bogi Gregersen (Jenel C. Gorgenurc, 82.), Jónhard Frederiksberg

GK: Iulian Florescu, 45.